# Tað er framvegis púra opið

**Javnleikurin á Sevmýri ber við sær, at einki er avgjørt frammanundan, at Skála og TB leygardagin fara á vøllin á Skála**

ENDASPÆL
Jóannes Hansen



Tað er framvegis púra opið. Seinnapartin mikudagin endaði tað 1–1, tá ið Skála vitjaði á Tvøroyri. Harvið er eingin upplagdur favorittur, tá ið TB seinnapartin leygardagin fer norður á Skála. Um einki mál verður skorað leygardagin, so verður Skála í 1. deild. Um TB fer at vinna, so flyta teir upp, og so skal Skála flyta niður. Um Skála fer at vinna, so verður eingin broyting. Um tað verður javnleikur, verður longd leiktíð á skránni, um úrslitið verður 1–1. Um úrslitið verður 2–2 ella kanska 3–3, so verður tað TB, sum fer at flyta upp, orsaka av fleiri útivallarmálum.

Fyrra umfarið á Sevmýri var ikki so skipað spæl at síggja. Skála hevði fríska lotið undan, og báðir partar tóktust órógvaðir av vindinum. Eftir steðgin datt lotið burtur, og tá var spælið meiri skipað.

Tvørámenn løgdu, sum teir altíð gera á heimavølli, ágangandi fyri, men tá ið tað dovnaði eitt sindur hjá teimum, var Skála leikliga omaná. Serliga fyrstu løtuna eftir steðgin var Skála betri fyri. Alexander Johansen var tvær ferðir leysur frammanfyri TB málinum, Jónhard Frederiksberg var eisini í góðari støðu, men teir fingu ikki mál. Tað kunnu TBararnir fyrst og fremst takka Magna Hentze fyri. Hann var í málinum, tí Poul Eli Bærentsen var leikbannaður, og hann var rættuliga sannførandi.

Skála legði seg framum, tá ið seinna umfarið var sjey minuttir gamalt. Pauli G. Hansen legði innfyri úr høgru, og miðverjin Dusan Jaic var hægstur og stútaði í málið.

Eftir at hol var komið á, spenti TB seg orduliga út. Skálamenn megnaðu ikki at varðveita bóltin frammi á vøllinum. Heimamenninir trýstu spælið fram á helvtina hjá Skála. TB hevði ikki fleiri upplagdar málmøguleikar, men tað var fleiri ferðir tætt við, tá ið bólturin var í brotsteiginum, og í 71. minutti eydnaðist tað. Eftir gott uppspæl í vinstru miðjum Rasmus Nolsøe og Dan Mortensen legði hesin seinni innfyri málið, har toppskjúttin í 2. deild, Kaj Roest, var hægri enn verjuspælari, og sera hegnisliga snittaði hann við høvdinum bóltin í handaru síðu av málinum.

Eitt korter fyri leiklok varð Alaksander Jovevic hjá Skála rikin av vøllinum fyri hevnisøku. Frammanundan hevði hann roynt seg við fínum fluktskoti, sum Magni Hentze refleksbjargaði.

TB helt fram at trýsta, men skálamenn, sum ikki vóru nøgdir við leikliga avrikið hjá sær sjálvum, megnaðu at halda tætt, sjálvt um teir síðsta kortérið vóru undirmannaðir.

Hjá TB verður málverjin, Poul Eli Bærentsen, tøkur aftur leygardagin. Avrikið hjá Magna Hentze ger tað ivaleyst torført hjá TB venjaranum at taka støðu til, hvør skal verja málið á Skála.

Hjá Skála verður Alaksander Jovevic leikbannaður eftir reyða kortið. Bogi Gregersen verður tøkur aftur eftir leikbann, og á Skála vóna teir, at Julian Floresco, sum hevur verið burturstaddur síðstu vikuna, kemur afturíaftur undan leygardegnum.

**Endaumfar um eitt pláss í 1. deild**
**TB–Skála 1–1 (0–0)**
0–1: Dusan Jaic 53.
1–1: Kaj Roest 71.
**Dómari:** Dagfinn Olsen

**TB:** Magni Hentze – Óli Johannesen, Jon Johannesen, Jens Rói Sørensen – OIiver Abrahamsen, Bárður Dimon, Einar Petersen, Rasmus Nolsøe – Dan Mortensen, Kaj Roest, Hallur Christiansen (Hanus Stórhamar, 70.)
**Einki kort**
**Skála:** Eugen Voda – Ronni Hansen, Dusan Jaic, Arnhold Berg, Bárður Danielsen – Alexander Johansen, Hanus Thorleifsson, Pauli G. Hansen, Aleksander Jovevic, Rói Jacobsen (Teitur Joensen, 36.) – Jónhard Frederiksberg
**Reytt kort:** Aleksander Jovevic 75.

# Skúlar út at renna í dag

**Í dag verður árliga skúlarenningin í nógvum skúlum kring landið. Hetta er 20. árið, at runnið verður**

Føroya Ítrottalærarafelag bjóðar aftur í ár skúlunum at vera við til ta árligu skúlarenningina. Fyrstu ferð skipað varð fyri Norðurlendskari skúlarenning var í 1983, og er hetta sostatt 20. árið at runnið verður.

Flestu av hinum norðurlondum hava umskipað dagin soleiðis, at pláss eisini er fyri øðrum ítróttavirksemi. Føroyar og Ísland hava tó hildið fast um renningina.

Ítróttalærarafelagið hevur í ár gjørt av at runnið verður fríggjadagin 10. oktober. Tað stendur tó skúlunum frítt fyri at renna annan dag enn tann ásetta. Sigast skal, at fleiri skúlar longu hava runnið. Vit vita ikki, hvussu nógvir kilometrar føroysku skúlanæmingarnir leggja eftir seg henda dagin, men í fjør vóru fleiri enn 7000 renniprógv send skúlunum. Siga vit, at miðalnæmingurin rennur um 7 km., runnu føroysku børnini uml. 40.000 km tilsamans.

MBM hevur øll árini stuðlað tiltakinum, og hevur hetta gjørt tað møguligt at halda á í so langa tíð.

# 170 svimjarar hittast í Fuglafirði

**FS stevnan 2003 verður fríggja- og leygardagin**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Àrliga Svimjikappingin í Fuglafirði verður fríggja- og leygardagin 10 - 11 oktober. Tað er kapping fyri bólkarnar 1-2-3 sum eru svimjarar í aldrinum 8 til 12 ár.

Hetta er fyrsta kapping í hesum svimjiárinum fyri tey yngstu, so spennandi verður at síggja hvussu tey koma at klára seg.

Undirtøkan er sera stór, og verður talan væntandi um einar 170 svimjara úr øllum landinum sum møtast í Fuglafirði hetta vikuskiftið.

Hesi koma úr Tvøroyrar Svimjifelaag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Flot av Toftum, Skeggjar úr Gøtu, Reki úr Leirvík, Ægir úr Klaksvík og Fuglafjarðar Svimjifelag.

Kappingin byrjar fríggjakvøldið kl. 20:30 og endar leygardagin kl 16:30.

Grandprix kappingarnar sum verða svomnar hesaferð eru 50frí og 100frí.



# LÍF skal ansa sær

**Á Mølini á Eiði vóru teir á heimaliðnum óhepnir, at teir ikki í 2. hálvleiki fingu sigursmálið**

ENDAUMFAR
*Jóannes Hansen*

Heilt síðani tað í 1976 varð farið undir kapping í trimum deildum, hava leirvíkingar átt pláss í bestu ella næstbestu deildini. Leygardagin verður avgjørt, um teir eisini í 2004 skulu vera í 2. deild, ella um teir mugu finna seg í bara at spæla 3. deildar fótbólt.

Tað stendur púra javnt, eftir at LÍF mikukvøldið vitjaði teir næstbestu hjá EB/Streymi. Úrslitið var 1–1. Bæði málini komu í 1. hálvleiki. Niels Pauli Justinussen legði við beinleiðis fríspark út úr brotsteigar samankomingini í vinstru og dygst undir tvørtrænum LÍF framum miðskeiðis í 1. hálvleiki, og dygst undan steðginum javnaði Arnbjørn T. Hansen. Úr spískum í vinstru sendi hann innfyri málið, og bólturin smeyg sær í málið aftanfyri eitt sindur uttarlaga stadda Allan Joensen.

Eftir steðgin var heimaliðið leikliga omaná. Teir sendu í stólpan, og Leif Niclasen, sum akkurát var komin á vøllin, streyk ígjøgnum í vinstru og sendi dygst framvið handaru stólparótini. LÍF hevði eina ferð bóltin í EB/Streyma málinum, men tað varð kolldømt fyri rangstøðu.

Eyðfinn Joensen var eyðsýndur á EB/Streyma miðvøllinum, og leirvíkingarnir noyddust at brúka nógva orku upp á Teitur Joensen, sum arbeiddi nógv í álopinum hjá heimaliðnum.

Miðalaldurin hjá LÍF var væl hægri, enn hann var hjá EB/Streymi, sum hevði nógvar dugnaligar unglingar á liðnum. Leirvíkingar hava nú møguleikan á heimavølli, men teir mugu vísa betri hugburð, enn teir gjørdu hesa ferð, um tað skal eydnast hjá teimum. Fyrr í ár hevur LÍF vunnið á ÍF, sum vann gull, TB, sum vann silvur, og Sumba, sum vann bronsu. Men LÍF endaði næstaftast í 2. deild og stríðist nú fyri at sleppa undan niðurflytingini. At úrslitini hava verið so óstøðug kundi bent á, at tað fyrst og fremst er hugburðinum, at tað skal arbeiðast við.

**Endaumfar um pláss í 2. deild**
**EB/Streymur–LÍF 1–1 (1–1)**
0–1: Niels Pauli Justinussen 26.
1–1: Arnbjørn T. Hansen 44.
**Dómari:** Suni Johansen

# FCK venjari vitjar

**Fysiska venjingin er á skránni í vikuskiftinum, teir, sum hava lokið venjaraútbúgvingarnar hjá Fótbóltssambandinum, eru í vikuskiftinum stevndir saman at luttaka í skeiði í fysiskari venjing**

VENJARASKEIÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Føroyskir fótbóltsspælarar eru ikki nóg væl fyri, tá ið tað snýr seg um likamliga styrki. Tað var ein av boðskapunum, sum kom fram, tá ið føroyskir venjarar og ábyrgdarpersónar í feløgunum í sambandi við landsdystin á Svangaskarði ímóti Litava hittust í hølunum hjá Trygginarfelagnum Føroyar í Runavík at tosa um støðuna og útlitini hjá føroyskum fótbólti.

Ein av orsøkunum til, at tað varð stevnt saman til fundar um støðuna og útlitini, var, at úrslitini hjá føroysku feløgunum í altjóða kappingunum í summar ikki góvu nakra ábending um, at tað gongur rætta vegin.

Jógvan Martin Olsen er venjari hjá NSÍ, sum fyri fyrstu ferð royndi seg í UEFA Cup. Úrslitini vóru einki at reypa av. Jógvan Martin segði á fundinum, at hann var sannførdur um, at ein av orsøkunum til, at tað ikki hilnst so væl hjá føroysku feløgunum í Europa Cup er, at spælararnir eru ikki nóg væl fyri likamliga. Hann ásannaði samstundis, at førleikin, sum hevur verið at fingið í venjaraútbúgvingum í Føroyum, kundi havt verið betri, tá ið tað snýr seg um júst hetta økið.

– Eg sigi fyri meg. Førleikan at leggja miðvísar ætlanir og at syrgja fyri at tær verða útinntar, haldi eg kundi verið væl betri. Hetta er eitt øki, sum vit ikki hava lagt so stóran dent á. Men gongdin seinastu árini hevur víst alt meiri, at tað er neyðugt, at vit gera meiri við hesa venjingini. Tí átti hetta at verið nakað, sum FSF bjóðaði venjarum at útbúgva seg í, segði Jógvan Martin Olsen.

NSÍ venjarin er eisini í starvi hjá Fótbóltssambandinum. Nú hava FSF og Jógvan Martin syrgt fyri, at føroyskir venjarar nú í vikuskiftinum hava møguleika at fáa undirvísing og íblástur til fysisku venjingina. Anders Storskov, sum hevur ábyrgdina av kropsligu venjingini hjá Toda Jónsson og hinum í FCK, fer hetta vikuskiftið at halda skeið í fysiskari venjing. Anders Storskov er umframt úr FCK eisini kendur fyri at hava ábyrgdina av fysiskari venjing í øðrum høpum. Eitt nú verður hann nógv brúktur av Team Danmark, sum miðvíst arbeiðir við at menna bestu donsku ítróttarfólkini, soleiðis at tey verða betri før fyri at standa seg í eitt nú olympisku leikunum, HM kappingum og EM kappingum.

Farið verður undir skeiðið leygarmorgunin klokkan tíggju, og tað verður hildið á inntil seinnapartin sunnudagin klokkan trý. Skeiðið verður í FSF húsinum, og har skulu luttakararnir halda til alla tíðina, meðan skeiðið er á skránni.

Tað ber ikki til at melda seg til skeiðið hjá øllum. FSF hevur boðið teimum, sum umframt tey fimm grundskeiðini eisini hava lokið ungdóms– og seniorvenjaraskeiðini, sum Fótbóltssambandið hevur skipað fyri nógvu tey seinastu árini.

– Hetta hava vit gjørt, tí vit halda, at tað er neyðugt við ávísum førleika og royndum í venjarayrkinum, um skeiðsluttakararnir skulu fáa tað burturúr, sum vit rokna við, at tað eigur at bera til at fáa. Áhugin tykist vera rættuliga stórur. Talið á teimum, sum longu hava meldað til liggur um tjúgu, so tað er ikki óhugsandi, at samlaða luttøkutalið fer at vera onkra staðni mitt í tjúgunum, sigur Jógvan Martin Olsen.

# Miðvágs Badmintonfelag 40 ár

Í dag fyllir Miðvágs Badmintonfelag 40 ár.

Øll árini hevur felagið verið virkið.

Á 40 ára degnum fær felagið nýtt búmerki sum ein av limunum Michael Gram hevur gjørt.

Búmerki ímyndar Vágoynna, ein ketchara og badmintonbólt, tað er einkult og sigandi, at júst Vágoyggin er á myndini sigur eisini, at hetta er eitt felag fyri alla oynna.

Tað koma eisini úr allara oynni at spæla badminton – heilt úr Bø.

Kappingarárið er júst byrjað, og fyrsta dagin teknaðu væl fleiri enn 100 børn og ung seg til venjing.




## Okkum tørvar ítróttarskrivara

Dámar tær ítrótt? Dugir tú at arbeiða sjálvstøðugt og liggur væl fyri at skriva?

So ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir á ítróttaredaktiónini.

Ítróttaskrivingin hevur seinastu nógvu árini verið raðfest ovarliga á Sosialinum, og fyri framhaldandi at halda fast um oddastøðuna á økinum sóknast vit tí eftir einum medarbeiðara. Talan verður í fyrstu syftu um partíðarstarv.

Umframt ítróttarskrivingina á Sosialinum verður partur av uppgávuni røkt av navnaøkinum, www. sportal.fo.

Vit rokna við, at tú hevur ein breiðan áhuga fyri føroyskum ítrótti, herundir ikki minst vetrarítróttargreinum. At tú ert álítandi og hevur góðan kunnleika til føroyska málið, og at tú hevur góð evni at bera teg fram á skrift.

Umsøkjarar við journalistiskari útbúgving hava fyrimun, men er hetta tó eingin treyt.

Er ynski at fáa nærri at vita um starvið, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 223 369 ella Eirik Lindenskov á tlf. 216 409. Ella við at senda teldubræv til jonhard@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 20. oktober 2003

**Umsóknir skulu sendast til:**

Sosialurin
postsmoga 76
110 tórshavn

Merkið brævbjálvan **»umsókn«**

Sosialurin

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk.
Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.